# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Rasmus Hansen, ættaður úr Sandavági, búsitandi í Grasmyr í norður Norra**, andaðist 26. februar, 86 ára gamal.

**Peter Kjeldgaard Sandoy**, sonur Bergljót Sandoy, andaðist mikudagin 24. februar, 39 ára gamal. Jarðarferðin verður hósdagin 4. mars kl. 14.30 úr Budolfi kirkju í Ålborg. Tey, ið vilja minnast Petur, kunnu lata eina peningagávu á konto í Føroya banka.

†

Peter Kjeldgaard Sandoy, sonur Bergljot Sandoy, andaðist 24. februar 39 ára gamal.

Jarðarferðin verður 4. mars kl. 14.30 úr Budolfi Kirkju Ålborg.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, kona, dóttir, svigerdóttir og systir okkara

**Kathrina Kjærbæk Jensen**
ættað úr Tórshavn
búsitandi í Miðvági

andaðist í heiminum sunnudagin tann 21. februar 2010, 31 ára gomul.

*Familjunnar vegna*
**Henny og Derhard,**
**Jacoba, Christian, Johannes og syskini**

Tey, ið vilja minnast Kathrinu, kunnu lata dóttrini eina gávu, konta í Suðuroya Sparikassa 9870-703.602.8.

# Elskaða gubba mínum Herman til minnis

Hevði eg bara vitað, tá eg fór av landinum aftur eftir jóla- og nýggjárshøgtíðina, at eg ongantíð aftur skuldi fáa møguleikan at tosa við teg, Gubbi, so hevði tað verið so ótrúliga nógv, eg tá hevði viljað sagt tær og takkað tær fyri. Tí eg havi av sonnum nógv at takka tær fyri, og hóast eg ongantíð segði tær tað í orðum, so eri eg fullvísur í, at tú veitst, hvussu góður, eg var við teg. Seinastu ferðina vit sóust – og skiltust, segði tú sum vant. "Hav tað gott, góði – Jesus-pápi fylgi tær".

Sum elsti pápabeiggi og gubbi mín átti tú í stóran mun leiklutin sum abbi mín í faðirætt. Mær untist ongantíð at uppliva abba mín. Nógv av dýrastu barndómsminnum mínum havi eg í Klokkaragøtu hjá tær og ommu. Heimið hjá tykkum var mítt annað heim; har var eg nógv eftir skúlatíð – hevði eisini nógv vinfólk har í grannalagnum.



Upp á nógvar mátar hevur tú altíð verið mín stóra fyrimynd – mín hetja. Tú hevði Hvítaklett og skeyt stórhval, tá eg var smádrongur – tað var altíð spennandi at hoyra um tað og síggja myndir. Stuttligt var eisini altíð at koma norður til Áir, tá tit komu aftur av stórhvalaveiðu.

Tú vart sera sterkur og væl fyri – nakað, eg altíð havi verið inspireraður av. Raskur, dugnaligur og arbeiðssamur vart tú sum fáur. Men tað, eg helst komi at minnast teg mest fyri, er títt lyndi: Tú vart so einastandandi góðlyntur, hjálpsamur og rættvísur. Tað er nakað, eg royni at taka til mín og liva eftir.

Hetta eru alt orð, eg ongantíð fekk sagt tær, meðan tú enn vart á lívi – tíverri. Men eg vil takka tær fyri alt tað, tú hevur verið fyri meg, elskaði gubbi.

Friður veri yvir minninum um teg, góði – Jesus pápi fylgi tær.

**Herman Mohr Hermansen,**
**Malmö 27. február 2010**

Fyri 20 árum síðan:

# Sosialurin fimm ferðir um vikuna

Hósdagin 1. mars 1990 skrivar Tíðindablaðið Sosialurin, at frá komandi viku fer blaðið at koma út fimm ferðir um vikuna frá týsdegi til leygardag. Við øktu útgávuni skuldu allir møguleikar verið fyri at gjørt blaðið enn meira aktuelt.

Annars komu stóru tíðindabløðini út tríggjar ferðir um vikuna: týsdag, hósdag og leygardag.

*Kelda: Sosialurin hósdagin 1. mars 1990*



tíðindablaðið
sosialurin

Selt seymimaskinur í 30 ár

5 ferðir um vikuna

Byggitíðin er stutt, og skal halda

Síða 9

Skipaður stuldur av prutlum

*Blaðið skrivar um Marjun og Petur Heimá, sum hava selt Bernina seymimaskinur í 30 ár*

**Prógvhandan**
Rani Djurhuus Jakobsen úr Kollafirði hevur í februar mánaða 2010 tikið prógv við heitinum „Master of Arts in Management" við Universitetið í Brighton.



**Merkisdagar**

**75 ára føðingardagur**
Mánadagin 1. mars verður Nicolina Davidsen, Heiðavegur, Saltangará, 75 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Dagurin**

**1. mars. Albinus**, deyður ár 550. Abbati og biskupur í Angers í Fraklandi. Varð stutt eftir deyða sín skírdur halgimenni. Navnið merkir hvítur.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*